# Sersáttmáli millum

**P/f Ocean group Faroes Ltd**

Og

**Føroya Skipara- og Navigatørfelag**

Viðvíkjandi m/s Norðhavið, VN 207 XPXN

Millum omanfyri nevndu partar er í dag gjørd henda semja:

Manningin á Norðhavinum VN 207 XPXN skal avroknast soleiðis:

1. Tá skipið fiskar ídnaðarfisk í Norðsjónum, skal skipið ganga eftir sáttmálaásetingunum fyri ídnaðarskip – í løtuni við einum býtisprosenti á 27,0.
2. Tá skipið fiskar makrel, sild og svartkjaft, skal skipið ganga eftir sáttmálaásetingunum fyri nótaskip – í løtuni við einum býtisprosenti á 17,5.
3. Semja er um, at reiðaríið rindar FSN avgreiðslugjald fyri sáttmálan, svarandi til limagjaldið hjá hvørjum einstøkum felag fyri hvønn mannin.
   Partarnir eru samdir um, at avgreiðslugjaldið ferð av óbýttum.
4. Viðvíkjandi felagsfisking ella "joint fishing" (partroling ella fiskiskip/móttøkuskip) skal býtast soleiðis, at Norðhavið VN 207 XPXN í mesta lagi fær 70 prosent av avreiðingarvirðinum.
5. Felagsreglurnar í høvuðssáttmálanum millum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag eru galdandi.
6. Partarnir eru samdir um. ***Um annar av pørtunum brýtir ásetingarnar í hesum sáttmála, so kann hin parturin slíta sáttmálan, um ikki brotið er rættað innan 3 dagar eftir at tann sum hevur brotið sáttmálan hevur fingið fráboðan um hetta.***

Hesin sersáttmáli er galdandi til ársenda 2017.

Hesin sersáttmáli er skrivaður í tveimum eintøkum – eitt til hvønn partin.

Tórshavn 24. mai 2017

**Føroya Skipara- og Navigatørfelag**

Annfinnur Garðalíð, formaður

**P/f Ocean group Faroes Ltd**

Alex Vilhelm